BARNANNA UMBOÐSMAÐUR
OG TÚ

Hvat ger barnanna umboðsmaður

Løgtingsins umboðsmaður er eisini barnanna umboðsmaður og ansar eftir, at myndugleikar og stovnar lurta eftir sjónarmiðum hjá børnum og ungum og virða rættindi teirra.

Barnanna umboðsmaður hevur fýra høvuðsuppgávur:

- At viðgera klagur og taka ímóti spurningum, ið snúgva seg um børn. Klagurnar og spurningarnir kunnu vera frá bæði børnum og vaksnum.
- At taka mál upp sjálvur, har illgruni er um, at børn ikki hava verið rætt viðfarin. Hetta kunnu t.d. vera mál, sum koma fram í fjølmiðlunum.
- At vitja almennar og privatar stovnar, har sum børn eru, og fosturfamiljur, har meira enn eitt fosturbarn er. Vit kanna, um stovnarnir og fosturfamiljurnar halda allar lógir og reglur, og um børnini hava tað gott.
- At ansa eftir, at barnarættindasáttmálin hjá ST verður hildin í Føroyum.

Hvørjum kann umboðsmaðurin hjálpa tær við?

Her eru nøkur dømir um, hvat umboðsmaðurin kann hjálpa tær við.

Tú ert ónøgd/ur við eina avgerð hjá einum myndugleika

Um ein myndugleiki hevur tikið eina avgerð, sum viðvíkur tær, og sum tú ert ósamd/ur í ella kedd/ur av, kanst tú klaga til umboðsmannin. Tú kanst eisini klaga til umboðsmannin, um myndugleikin ikki hevur spurt teg um tína meining, áðrenn avgerðin varð tikin.

Vit kunnu kanna, um myndugleikin hevur fylgt reglunum. Hevur hann ikki tað, kunnu vit biðja hann viðgera málið umaftur. Vit kunnu ikki gera av, hvat myndugleikin skal gera, men myndugleikarnir gera næstan altíð tað, sum vit biðja teir um.

Við hvørt ber til at kæra eina avgerð hjá einum myndugleika til ein annan myndugleika. Tá kunnu vit hjálpa tær at senda kæruna til rætta myndugleikan.

Myndugleikin lurtar ikki eftir tær

Um skúlin ella málsviðgerin hjá einum myndugleika ikki vil hjálpa tær og ikki lurtar eftir tí, tú sigur, ella ikki skilur, hvat tú meinar, kanst tú klaga til umboðsmannin.

Vit kunnu skriva eitt bræv til skúlan ella málsviðgeran og greiða honum frá tí, sum tú hevur sagt okkum.

Tú hevur tað ikki gott hjá fosturfamiljuni

Um tú ikki býrt hjá foreldrum tínum, men hjá eini fosturfamilju ella á einum stovni, og tú heldur, at tú verður skeivt viðfarin, kanst tú klaga til umboðsmannin.

Vit kunnu kanna, hvussu umstøðurnar eru, har sum tú býrt, og biðja fosturfamiljuna ella stovnin broyta tað, sum vit halda, ikki er í lagi.

Mamma og pápi tín eru skild, og tú vilt vera við til at avgera, hvar tú skalt búgva

Vit kunnu ikki gera av, hvar tú skalt búgva, men vit kunnu hjálpa tær at skriva eitt bræv til Ríkisumboðið og greiða frá um tíni ynskir. Tað er Ríkisumboðið, sum ger av, hvar børn skulu búgva, tá foreldrini verða skild.

Hvussu kanst tú klaga?

Tað eru fleiri ymiskir mátar, tú kanst brúka, tá tú klagar til umboðsmannin.

Tú kanst ringja til okkum á tlf. 358 500

Tú kanst senda ein teldupost til bum@bum.fo ella fylla út eitt oyðublað á heimasíðuni www.bum.fo og senda tað við brævi til Løgtingsins umboðsmann, undir Bryggjubakka 11, Postsmoga 2008, 110 Tórshavn.

Tú kanst vitja okkum á skrivstovu okkara undir Bryggjubakka 11 í Havn millum kl. 10 og kl. 15 hvønn gerandisdag.

LUM.FO

LØGTINGSINS
UMBOÐSMAÐUR

undir Bryggjubakka 11 · Postsmoga 2008 · FO-110 Tórshavn · +298 358 500 · lum@lum.fo · www.lum.fo